# Várkonsert við kamarkóri

**Tórshvnar Kamarkór hevur leygardag árligu várkonsert sína. Hon verður hildin í Mülleres Pakkhúsi kl. 19.30**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Vatn og hav, gleði-sorg, kærleiki-hatur. Øll fyribrigdi, sum vit í Føroyum hava intiman kunnleika til og upplivingar við. Men hesi eru eisini eru evnini, sum sungið verður um á várkonsertini hjá Tórshavnar Kamarkóri leygarkvøldi kl. 19.30 í Müllers pakkhúsi.

Kórið býður teimum lurtandi við á eina ferð bæði í rúmi, tíð, og í tónleiki, og hetta eru hølini í Müllers Pakkhúsið serstakliga væl egnað til.

Vit fara víða um: Úr Føroyum og 20. og 21. øld til Valparaiso og Rovaniemi, umframt at vit vitja Svøríki í 19. og 20. øld og heilt aftur til Onglands, Fraklands og Italiu í 15. og 16. øld.

Á ferðini verða at hoyra søgur um tann fyrsta kossin, jalousi og kærleika – bæði um lukkuligan og miseydnaðan – og hatur, soleiðis sum Evert Taube, T.N. Djurhuus, Orlando di Lasso, Monteverdi, Dowland og Carl Orff imynda sær tað.

Hav og vatn hava altíð hugtikið yrkjarar og tónaskøld; bæði vakurleikin og friðurin, og tann oyðandi megin, sum vatn hevur í sær. Kórið fer at framføra 5 sangir við hesum evnum, 4 føroyskar og ein enskan.



*Við í Tórshavnar Kamarkóri eru 30 sangarar og kórleiðari er Kári Bæk*

# »Kórið hjá Jóhan« fer til Prag

**"Kórið hjá Jóhan" er eitt virkið blandað kór á Skálafjørðinum. Tað er í høvuðsheitinum mannað við kórsangarum av báðum ørmunum á Skálafjørðinum og venur í skúlanum í Runavík. Sunnukvøldið klokkan 20 hava tey konsert í Fríðrikskirkjuni**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Í kórinum syngja einir 35-40 sangarar, og kórleiðari er Jóhan Mortensen. Kórið fer at hava konsert í Fríðrikskirkjuni nú sunnukvøldið klokkan 20:00

### Nógv venjing

Hesar seinastu mánaðirnar hevur dúgliga verið arbeitt við at leggja til rættis sangferð uttanlands. Longu í heyst varð avgjørt, at leiðin skuldi ganga til Prag, og at konsertir eisini skuldu standa á skránni á uttanlandsferðini.

Ferðalagið fer at telja 50 fólk. Av teimum eru 34 kórsangarar. Bólkaferðin er bíløgd gjøgnum Fonn-flog á Skálafjørðinum.

Hósdagin 6. apríl verður farið avstað við Norrønu. Ferðast verður við bussi aftur og fram millum Hanstholm og Prag. Á leiðini úr Hanstholm verður steðgað í Esbjerg í tríggjar tímar. Í samstarvi við føroyingafelagið í Esbjerg verður skipað fyri konsert í hølinum hjá Frelsunnarherinum. Tá konsertin er liðug, bjóðar føroyingafelagið ein náttúrðabita.

Eftir hetta verður hildið fram til Prag. Á leiðini verður vitjað í Theresienstadt, fangaleguni hjá týskarunum undir øðrum veraldarbardaga. Sunnudag seinnapart kemur ferðalagið so upp á pláss í hotellíbúðunum, sum verða bústaðurin teir fimm dagarnar, steðgað verður í Prag.

### Tvær framførslur í Prag

Tvær konsertir vera á ferðini í Kekkia. Samband er fingið í lag við kekkisk kór, sum eisini fara at vera við á konsertunum. Kekkisku kórini og Kórið hjá Jóhan fara eisini at syngja okkurt í felag.

Tann fyrra konsertin verður mánakvøldið 10. apríl í Brandys nad Labem. Hetta er býur á støðd við Havnina, og liggur hann einar 25 km uttan fyri Prag. Í býnum er eitt slott, og í slottskirkjuni skal konsertin vera. Kekkiska kórið syngur fyrst einar tríggjar kekkiskar sangir, og síðani eigur føroyska kórið pallin. At enda syngja bæði kórini saman "Ave verum corpus" hjá Mozart. Fylgispælið fer evnaríki pianisturin Jórun Hansen á Skipanesi at hava. Jóhan fer sjálvur at stjórna.

Seinna konsertin verður í einari kirkju – Sankta Martin í Múrinum – inni í miðbýnum í Prag mikukvøldið 12. apríl. Henda konsertin verður saman við einum øðrum kóri, ið er heimahoyrandi í Prag. Á hesari konserini verður mannagongdin á leið tann sama sum á tí fyrri. Eisini her endar konsertin við, at bæði kórini syngja okkurt í felag. Í hesum førinum verða tað tvey stykkir: "Ave verum corpus" av Mozart og "Locus iste" av Bruckner.

Á uttanlandsferðini hevur "Kórið hjá Jóhan" fleiri føroyskar og norðurlendskar sangir á skránni. Umframt tað er onkur negroe spiritual og okkurt av Bach, Beethoven og Andrew Lloyd Webber.

Meðan ferðalagið er í Prag, verður skipað fyri ymsum felags tiltøkum so sum býarrundferð, sigling á ánni Moldau og teaturvitjan á Laterna Magika.

Føroyska ferðalagið fer úr aftur Prag seinnapartin langafríggjadag. Dagin eftir verður siglt úr Hanstholm móti Føroyum.


Vit sóknast eftir dugnaligum fólki...



· Kokkur
· Kokkalærlingur
· Tænaralærlingur

**Kokkurin:**

Sum kokkur á Hotel Vágum kemur tú at hava dagliga ábyrgd í tøttum samstarvi við leiðsluna og hini starvsfólkini í køkinum.

Tilrættislegging av matarskrá, útbúgving av lærlingum og bílegging av vørum hoyrir við til dagliga arbeiðið.

**Kokkalærlingurin:**

Ert tú lættur av lyndi, næmur og hevur áhuga í gastronomi, so ert tú júst tann rætti at møta teimum avbjóðingum, ið koma fyri innan okkara yrki.

**Tænaralærlingurin:**

Ert tú tænastuhugaður, næmur og hevur sera góðan hug at søkja størri avbjóðingar innan matstovuyrkið, so hava vit karmarnir, sum kunnu føra teg víðari.

TEAM85

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Kára Hentze á tel 30 90 90

*GG! --- Størvini verða sett skjótast gjørligt!*

HOTEL VÁGAR
Flogfelag Føroya · Sørvágur
tel 30 90 90 · fax 30 90 91 · hotel@ff.fo

